# Skulu samstarva vi› Danmark

*Løgma›ur heldur fast vi›, at Føroyar framhaldandi skulu hava gjaldoyrasamtarv vi› Danmark, hóast Danmark ver›ur uttan fyri evrusamstarvi›*

JOHN JOHANNESSEN

Vit skulu ikki vera í gjaldoyrasamstarvi vi› Danmark bert fyri at gerast partur av evrusamstarvinum.

Hetta sigur løgma›ur eftir at ta› er vor›i› greitt, at danir ikki ver›a vi› í evropeiska gjaldoyrasamstarvinum.

Tí heldur løgma›ur eisini, at vit framhaldandi í samrá›ingunum um ríkisrættarligu stø›una skulu mi›ja eftir at hava gjaldoyrasamstarv vi› Danmark.

## Einki kjak

Løgma›ur hevur á›ur bo›a› frá, at hann heldur ta› vera fyrimun fyri Føroyar, um Føroyar gerast partur av evrusamstarvinum gjøgnum Danmark.

Tí hevur hann eisini bo›a› frá, at vit í Føroyum skuldu hava eitt politiskt kjak um evruna, um danir søgdu ja á fólkaatkvø›uni hósdagin.

Men nú ta› er greitt, at danir hava sagt nei til evruna, heldur løgma›ur ta› vera óney›ugt at seta hol á eitt kjak um, hvørt Føroyar skulu vera vi› í evrusamstarvinum ella ikki.

– Vit hava gjørt av, at vit skulu ver›a verandi í gjaldoyrasamstarvi vi› Danmark, og nú ta› er greitt, at danir ikki fara upp í evrusamstarvi›, hava vit einki at kjakast um, sigur løgma›ur.

Høvdu danir sagt ja til evruna, skuldu vit í n‡ggjar samrá›ingar vi› danir um gjaldoyrasamstarv. Og tá heldur løgma›ur, at ta› hev›i veri› heilt náttúrligt vi› einum politikskum kjaki í Føroyum um evruna.

## Fyrimunir vi› evruni

Løgma›ur ásannar, at ta› hev›i veri› bíligari fyri føroysku vinnuna, um vit vóru vi› í evopeiska gjaldoyrasamstarvinum. Hetta, heldur hann, hev›i veri› galdandi bæ›i fyri út- og innflutningsvinnuna.

Men samstundis vísir løgma›ur á, at hóast 85 prosent av okkara útflutningi fer til ES lond, fara bert 30 prosent av útflutninginum til lond, i› hava valt at n‡ta evruna sum gjaldoyra.

– Tey evropeisku londini, vit útflyta mest til, eru Danmark og Bretland, vísir løgma›ur á.

Tískil handla vit í mestan mun í pundum og krónum.



*– Vit hava gjørt av, at vit skulu ver›a verandi í gjaldoyrasamstarvi vi› Danmark, og nú ta› er greitt, at danir ikki fara upp í evrusamstarvi›, hava vit einki at kjakast um, sigur løgma›ur*

## Rætt vi› samstarvi

Anfinn Kallsberg heldur, at vit sjálvsagt alla tí›ina skulu hava eyguni eftir, hvat gjaldoyrasamstarv einar sjálvstø›ugar Føroyar kunnu fara uppí. Men samstundis setir hann spurningin, um talan so skuldi veri› eitt samstarv um pund ella dollarar.

Løgma›ur vísir á, at olja vanliga ver›ur keypt og seld fyri dollarar. Tí vísir hann á, at ta› kundi veri› ein fyrimunur at havt dollaran sum gjaldoyra, um oljuvinna ver›ur veruleiki í Føroyum.

Men kortini heldur Anfinn Kallsberg ta› vera rættast, at vit framhaldandi halda okkum til eitt gjaldoyrasamstarv vi› Danmark.

– Sí›ani kunnu vit sum partur av donsku gjaldoyraskipanini finna samstarv, ger løgma›ur greitt.

## Meira enn bert evra

Løgma›ur heldur, at danska fólkaatkvø›an snúi seg um nógv meira enn bert eitt val millum evru ella krónu.

– Fólkaatkvø›an í Danmark snúi seg um størri ella minni sameining vi› ES. Fólk vilja hava at vita, hvussu nógv vald ES skal hava í Danmark, og tí valdu tey at stø›ga á fyri at fáa eitt kjak í lag, sigur Anfinn Kallsberg, løgma›ur.

– Snúi vali› seg bara um ja ella nei til evruna, ivist eg onga løtu í, at úrsliti› hev›i veri› eitt stórt ja, ger løgma›ur greitt.

Anfinn Kallsberg er ikki bangin fyri, at krónan fer at svinga í kursi samanbori› vi› evruna. Grundgeving hansara er, at krónan er so miki› tætt kn‡tt at evruni, at hon fer at fylgja henni.

# Fleiri fyrimunir vi› evruni



*Ta› hev›i veri› til fyrimuns fyri føroyska útflutningin, høvdu vit evruna sum gjaldoyra, sigur Hans Johannes á Brúgv*

*Ta› hev›i veri› til stóran fyrimuns fyri føroysku útflutningsvinnuna, um danir atkvøddu ja til evruna á fólkaatkvø›uni, vísir stjórin á Fiskasøluni á*

JOHN JOHANNESSEN

Høvdu danir atkvøtt fyri evruni og Føroyar sostatt komu vi› í evrusamstarvi›, hev›i hetta gjørt útflutningsmarkna›in hjá føroyingum størri, tryggari og betur.

Hetta heldur Hans Johannes á Brúgv, stjóri á Fiskasøluni.

Hans Johannes á Brúgv vísir á, at føroyska útflutningsvinnan kundi fingi› væl meira av peningi burturúr, høvdu vit evruna sum gjaldoyra. Hetta hev›i nevniliga gjørt, at vit sluppu undan at veksla allar inntøkur um til krónur og vera noydd at rinda gjald fyri vekslan.

Eisini høvdu vit vi› evruni sum gjaldoyra sloppi› undan at tryggja hvørt oyra, vit handla vi›, fyri kurstapi mótvegis teimum stóru gjaldoyrunum, vísir Hans Johannes á Brúgv á.

## Stór umsiting

Stjórin á Fiskasøluni sigur, at heili 80 prosent av føroyska fiskinum, sum ver›ur útfluttur, ver›ur seldur til lond í ES.

– Hetta merkir, at meginparturin av okkara handlum fara fram í evrum, sigur Hans Johannes á Brúgv.

Men samstundis vísir fiskasølustjórin á, at tá roknskapurin skal gerast upp, skal hann gerast upp í krónum. Hetta merkir, at peningurin má vekslast, og ta› kostar.

Í veruleikanum merkir hetta, at Fiskasølan er noydd at arbei›a í krónum alla tí›ina. Og tá krónan er eitt so miki› líti› gjaldoyra í mun til evruna, er ney›ugt at tekna tryggingar móti kurstapi, og hetta kostar eisini.

Alt hetta skapar eina nógv størri umsiting, enn ta› hev›i gjørt, høvdu vit evruna til gjaldoyra, vísir Hans Johannes á Brúgv á.

## Fer ikki at órógva

Hóast ta› nú er greitt, at evran ikki ver›ur føroyskt gjaldoyra tey næstu mongu árini, roknar Hans Johannes á Brúgv kortini ikki vi›, at danska avger›in fer at gera arbei›i› hjá føroysku útflutningsvinnuni uppaftur truplari.

– Hetta fer helst ikki at merkja nakra broyting í okkara arbei›i, og eg rokni heldur ikki vi›, at danska nei-úrsliti› fer at órógva evropeiska markna›in fyri fisk, sigur Hans Johannes á Brúgv.





*Løgfrø›ingur sigur, at líknandi ákærur, sum tann móti Tórbjørn Jacobsen, oftast enda vi› bót ella hefti*

# Fútin fer at ákæra Tórbjørn

*Eftir áheitan frá Sjófer›slust‡rinum fer fútin í næstum at reisa ákæru móti Tórbjørn Jacobsen, landsst‡rismanni, fyri brot á sjóreglurnar, tá hann rendi á land vi› skipi sínum, Halgafelli*

JOHN JOHANNESSEN

Ein av komandi døgunum ver›ur ákæra reist móti Tórbjørn Jacobsen, landsst‡rismanni.

Ta› er danska Sjófer›slust‡ri›, i› hevur heitt á fútan um at reisa ákæru móti landsst‡rismanninum fyri brot á sjóreglurnar í sambandi vi›, at hann 11. januar í ár rendi á land vi› skipi sínum, Halgafelli.

Ákæran er ikki reist enn, men Mogens Nepper Kristensen, fúti, sigur vi› Sosialin, at ta› er vanlig mannagongd hjá fútanum at fylgja áheitanum frá slíkum stovnum, sum Sjófer›slust‡rinum.

## Umhugsar stø›una

Tórbjørn Jacobsen bo›ar sjálvur í tí›indaskrivi frá, at hann hevur fingi› bræv frá Sjófer›slust‡rinum, har hann ver›ur kunna›ur um, at Sjófer›slust‡ri› hevur heitt á fútan um at reisa ákæru.

Men Tórbjørn Jacobsen vísir tó á, at hann enn einki hevur hoyrt frá fútanum, og tí hendir enn einki í málinum.

– Tá Landfogeden på Færøerne einafer› hevur vi›gjørt máli› og er komin til eina ni›urstø›u, fer undirrita›i at taka máli› upp av n‡ggjum og meta um hvørjar møguligar politiskar avlei›ingar máli› skal fáa, skrivar Tórbjørn Jacobsen í tí›indaskrivinum.

Landsst‡risma›urin ætlar sær sostatt ikki sjálvur at taka stig til nakarar politiskar avlei›ingar fyrr enn fútin er komin til eina ni›urstø›u í málinum.

Í Føroyum hava vit enn onga si›venju fyri, hvørjar politisku avlei›ingarnar eru, tá ákæra ver›ur reist móti landsst‡rismanni. Einasta dømi, vit kenna, er tá John Petersen var› sitandi sum landsst‡risma›ur í fiskivinnumálum, hóast hann var ákærdur fyri ney›tøku. Í ør›um londum er ein ákæra nóg miki› til, at ein rá›harri tekur avlei›ingarnar og fer úr sessinum.

## Torført mál

Løgma›ur visti einki um brævi› frá Sjófer›slust‡rinum, fyrr enn Sosialurin ba› hann um vi›merkingar til máli› seinnapartin hósdagin.

Tí fekk løgma›ur ikki sagt, hvørjar stig, hann fer at taka í málinum. Men løgma›ur ásannar, at hann hevur ein trupulleika, tá ákæra ver›ur reist móti einum landsst‡rismanni.

Løgma›ur vísir tó á, at valbæri› ikki ver›ur tiki› frá løgtingslimi fyrr enn dómur, i› ljó›ar á meira enn f‡ra mána›ir í fongsli, er feldur móti honum.

Anfinn Kallsberg, løgma›ur fer nú at kanna máli› nærri.

Løgfrø›ingur, Sosialurin hevur tosa› vi›, sigur, at líknandi ákærur oftast enda vi› bót og møguliga vi› hefti.

Høgni Hoydal seg›i vi› útvarpi› hóskvøldi›, at Tjó›veldisflokkurin fer at vi›gera máli› um vikuskifti›.

# Helena hótti ikki



*Ta› er ikki rætt, at Helena Dam á Neystabø hótti vi› at leggja frá sær, sigur Karsten Hansen*

*Landsst‡risma›urin í fíggjarmálum vísir á, at ta› ikki er rætt, at Helena Dam á Neystabø hevur hótt vi› at fara úr landsst‡rissessinum, fekk hon ikki hægri játtan*

JOHN JOHANNESSEN

Ta› er ikki rætt, at Helena Dam á Neystabø á samgongufundi hótti vi› at siga landsst‡rissessin frá sær, fekk hon ikki 65 millónir meira enn ætla› á fíggjarlógini.

Hetta sigur Karsten Hansen í sambandi vi›, at fjølmi›larnir hava bori› tí›indi um, at landsst‡risma›urin í almanna- og heilsumálum fekk hægri játtan, fyri at hon ikki skuldi fara frá.

– Á hasum samgongufundinum var› ikki eitt komma flutt í fíggjarlógaruppskotinum, sta›festir Karsten Hansen.

Landsst‡risma›urin í fíggjarmálum ásannar, at Helena Dam á Neystabø ikki var og ikki er nøgd vi› játtanina, men fyri ta› fær hon ikki servi›ger›.

– Landsst‡ri› er samt um, at almanna- og heilsumál skulu hava høga játtan, og ta› hava tey eisini fingi›. Hetta málsøki› hevur seinastu árini fingi› 250 milliónir afturat, sigur Karsten Hansen.

Landsst‡risma›urin í fíggjarmálum vísir á, at orsaka› av, at almanna- og heilsumál fáa helvtina av játtanini á fíggjarlógini, sæst ein hækkan í játtanini ikki so væl í prosentum.


